# Ulves gule hyl

JÁKUP JOENSEN



**Orðini eigur Bjørnstjerne Bjørnson, sum var borin í heim í Noregi tann 8. desember 1832**

Vitt er til veggja í hesum rúmsátta hugtaki, sum júst í hesum døgum hoyrist úr Íslandi um øll heimsins høv og lond, nú forseti Íslands, Ólafur Ragnar Grímsson, sýtir fyri at staðfesta Icecave-lógina, sum nýliga varð samtykt í Altinginum. Málið skal til fólkaatkvøðu, sigur forsetin, sum sigur seg tá bert fylgja teirri demokratisku mannagongd, sum nú valdar í øllum tí nýggja Europa.

Hetta er lætt lop um rapaða garðin, tí forsetin veit, at íslendska fólkið í túsundtali hevur gingið kravgongur í Reykjavíkar gøtum og á tann hátt lýst sína støðu í málinum.

Fólkið krevur, at úlvarnir, teir, sum hava rænt fæ landsins og krógvað tað burtur, verða revsaðir, og ikki tey, sum einki hava fingið av gulli og góðsi. Men tað smakkar best í hesum døgum at skáka sær undan og gloyma, at valdið og ræðið á øllum heimsins viðurskiftum – bæði fíggjarligum og politiskum – hevur alla tíðina ligið í hondum fólksins, og tí eigur fólkið evstu ábyrgdina.

Og umheimurin øtast við, tá nú Altingið síðst í farnu viku strikar sína egnu samtykt og til fulnar tekur undir við forsetans "góðu og demokratisku europeisku siðvenju" og snarar málið til fólkaatkvøðu, hvørs úrslit longu er øllum greitt. Og tað rínir ikki á, at hesar avgerðir bera brá av avtalaðum spæli!

Einum kemur til hugs orð íslendingsins, tá hann í skemtiløtu verður lagdur undir at svara føroyinginum: Ney, ney, blessaður, egg bara seyð so. Teir høvdu lovað burtur olmussu á vandamiklari sjóferð og høvdu akkurát sjabbað land upp. Sjáldan rýkur av ongum brandi, verður sagt.

Hetta íslendska fyribrigdið verður eisini viðgjørt av Bjørnstjerne Bjørnson í brævi, hann á heysti 1867 skrivar til vinmannin Hilmar Finsens, ið tá var stiftamtmaður og landshøvdingi á Íslandi, soleiðis:

- Hvad der er offentliggjort om de islandske Forholde vidner vistnok om meget mangelfuld dansk Administration, men det vidner ogsaa om saamegen islandsk Vrangvilje og dum Umedgjørlighed, at det er godt, Islænderne i saa eminent Grad have sig selv til Venner, thi de have nu vist ingen anden – om de ogsaa have havt. Dertil maa det forbavse Enhver, at Islænderne have forstaaet saa lidt at arbejde for sig selv baade før og nu. Den samme blinde Egenkjerlighed, som de nu vise ligeoverfor Danmark, maa de før have vist og vise, den Ene ligeroverfor den Anden, og Alle ligeoverfor det Hele.

- Í einum øðrum brævi seinni sama heystið skrivar hann aftur til Hilmar Finsen og staðfestir so beinrakin: Jeg er vis paa, at den danske Rigsdag og Presse vil have Forstand til at overlade Island til sig selv, og da lade dets Hjælpekilder selv grave sig sine veje. (Símun av Skarði í Varðanum, bind 12).

Enn er langt á mál, men vónin er tó lív lagað tey komandi tólv hundrað árini.

**Lopra, tann 11. jan. 2010**

# Føroya Løgting eigur at tryggja øllum javnbjóðis rættindi

Í Landsfundarsamtykt Sjálvstýrisfloksins 2008, og í løgtingslógaruppskoti Løgtingsmál nr. 32/2008: Uppskot til løgtingslóg um viðferð teirra, ið hava goldið meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi, heitti Sjálvstýrisflokkurin á Føroya Løgting um at geva øllum føroyingum somu rættindini í MVG málinum. Hetta uppskot varð felt við aðru viðgerð á Føroya Løgtingi við atkvøðunum 23 nei, tvær blankar, tvær fyri.

Landsnevndin staðfestir og harmast um, at hvørki avvarðandi ráðharri ella samgonga hava himprast við, nú tað er staðfest bæði av Skatta- og avgjaldskærunevndini, (í úrskurði 25. oktober 2006, mál 06-03-31-40) Og av Føroya Rætti, at landsstýrið óheimilða hevur tikið ov nógvan pening frá túsundtals føroyingum.

Samgongan letur nú almenna stovnin TAKS einsamallan eiga alla ábyrgdina av illa smíðaðum lógum, ið landsstýrið einki ger fyri at bøta um.

Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins staðfestir enn einaferð, at málið er komið hagar, at bert Føroya Løgting kann og eigur at rætta upp tann skeivleika og órætt, sum nógvum føroyingum hevur verið fyri.

Tingið má staðfesta, at allir føroyingar fáa somu viðferð, tá ið rætturin hevur talað. Landið má tí seta fyrning til viks í hesum málinum.

Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins heitir á tingmanning floksins um sum skjótast at reisa málið um MVG gøluna á Tingi og leggja fram aftur: Uppskot til løgtingslóg um viðferð teirra, ið hava goldið meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi.

**Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins**

# Tering eftir nering

JÁKUP Á STONGUM



Hvussu nógv kostar eitt sambýlispláss?

Sambært Kommunufelagnum gjalda kommunurnar allar nýíløgur, viðlíkahald av bygningum og dagligan rakstur. Eisini ynskja kommunurnar stovnar í sína kommunu, tí tað gevur almenn arbeiðspláss. Men hvat kostar, og hvør skal gjalda?

Øll, fjølmiðlar og serliga Kringvarpið, okkara public service stovnur, eru á gosi um, at tey gomlu nú skulu gjalda meir fyri at búgva á sambýli. Onki var meiri sjálvsagt enn at okkara almenni miðil lýsti fyri okkum, hvørjar útreiðslurnar eru. Undarligt at landstýrið ikki ger tað.

**Er kringvarpið objektivt?**

Tað tykist mær sum um serliga útvarpið í heilum er í hernað móti tí til einhvørja tíð sitandi landstýri, bara fyri at vera tað. Hví ikki lýsa støður og sannleikar, soleiðis sum landið nú einaferð liggur?

Eitt lýsandi dømi er glantrileikurin, ein ávísur fólktingsmaður spælir móti sínum samstarvsfelagum og ikki minst móti uttanríkisráðnum. Hesin fær so sanniliga sína umtalu, meðan okkara uttanríkisráð, har kjøt veruliga er á visiónum og handlingum, fær lítla umtalu og heldur verður speirikið, klokkuklárt eftir divisuni um, at vit duga onki, orka onki, eru so pikkalítil, at onki ber til.

Á hini síðuni hava vit kong gularót. Meir enn nakað skínur fólkatingsmaðurin á danatingi av sjálvsøkni og bonaðum gólvum. Miðlarnir skuldu lýst okkum tað, men nei, nei, borin á lógvum, og vit mugu bíða eftir barninum: "Júmen? Mamma! Mamma! Maðurin er í ongum klæðum!"

Ein objektiv lýsing er neyðug, skulu støður skiljast og avgerðir takast.

Í 2004 gjørdi sPF Westtec eina greining av útreiðslum til almenn røktarpláss. Sambært hesum vóru rakstrarútreiðslurnar fyri ein brúkara á sambýli kr. 800,- um dagin, ella umleið kr. 25.000,- um mánaðin, hvønn mánað. Lítið man vera at ivast í, at hetta tal í dag er hækkað til kr. 30.000,-. Leggja vit nú pensjónina afturat og draga mánaðarliga gjaldið frá, skulu almennu Føroyar gjalda uml. (30.000 + 9.000) – 50000 = kr. 34.0000,- um mánaðin fyri hvønn brúkara á einum sambýli. Tá eru íløgurnar til at byggja sambýli ikki tiknar við.

Spurningurin er so: Hava vit føroyingar, við einum almennum halli uppá 1,4 milliard krónur, ráð til tað?

Latum okkum við tað sama sláa fast, at tað eru ikki tey gomlu, sum eru so kostnaðarmikil, tey hava altíð sett tering eftir nering. - Tey dýru eru vit og okkara nútíðarsamfelag, sum eru um tey.

Men onkur skal gjalda!

Avgerandi er at vit fáa lýst málini objektivt, eisini sjálvt um ein møgulig góð loysn fyri samfelagið gongur út yvir okkara persónliga dagligdag.

Loysnin má ongantíð verða, at danir skulu gjalda. Tá standa vit aftur sum fíni føroyingurin á danatingi. Nakin!

# Rættleiðing til umrøðu av listaverkinum *Bládýpinum* hjá Tróndi Patursson

HELGI FOSSÁDAL
stjóri, Listasavn Føroya



Sosialurin hevur í bløðunum 14. og 15. januar umrøtt støðuna hjá omanfyri nevnda listaverki, sum stendur á økinum hjá Listasavni Føroya.

Fyri at greiða frá málinum, sum tað er, vil eg koma við nøkrum rættleiðingum, til tær misvísandi endurgevingar í Sosialinum.

**Upplýsast skal, at:**

Ongin sáttmáli yvirhøvur finst millum Trónd Patursson og Listasavn Føroya um hetta listaverkið.

Listasavn Føroya eigur ikki listaverkið og hevur tað ei heldur í varðveitslu, og listaverkið hevur ongantíð verið skrásett á savninum.

Listasavn Føroya og listamaðurin eru samd um, at listaverkið stendur á einum ófjónaðum stað, og tað er vanvirðisligt fyri bæði listaverkið sjálvt, listamannin og eisini fyri Listasavn Føroya.

Listaverkið, sum stendur uttan umsjón, er stongt, tí tað er í ivasomum standi, har glas kann brotna og verða beinleiðis vandamikið fyri vitjandi, ikki minst fyri børn.

Listaverkið, sum er ein týdningarmikil partur av listini hjá Tróndi Patursson sum tað fyrsta av fleiri kosmisku rúmum, stendur heilt uttan fyri tað umhvørvið, tað upprunaliga var ætlað, nevniliga á einum havnaøki saman við fleiri øðrum líknandi listaverkum. Harumframt er globali dialogurin, sum listaverkið upprunaliga var liður í, horvin. Upprunaliga hugskotið við framsýningini *Container 96* í Keypmannahavn var júst at flyta listina burtur úr listasavnsumhvørvinum og skapa nýggj "listarúm" í dialogi við øðrvísi umhvørvi. Í hesum sambandi havi eg undirritaði skotið upp fyri listamanninum at flyta listaverkið í líknandi umhvørvi aftur, t.d. við at flyta tað oman á Farstøðina í Tórshavn.

Tá ið eitt listasavn fær boðið eitt listaverk sum gávu, skal listasavnið taka støðu til, um tað vil taka ímóti gávuni ella ikki. Sum limur í ICOM, altjóða ST stovninum fyri søvn, skal Listasavn Føroya fylgja teimum altjóða savnsreglum, sum eru galdandi, og harímillum ikki at taka ímóti gávum, ið vera givnar við treytum, tí Listasavn Føroya má sjálvt gera av, hvussu listaverkið verður nýtt í savnshøpi.

Tróndur Patursson er komin við uppskoti at geva Listasavni Føroya listaverkið við ávísum treytum, sum Listasavn Føroya ikki treytaleyst kann góðtaka. Savnið hevur havt fleiri fundir við listamannin um verkið, men enn er ongin endalig niðurstøða gjørd. Arbeitt verður framvegis við hesum máli.

Sambært ICOM kann eitt listasavn ikki hava listaverk standandi á ognum sínum, uttan at greiði er á ognarviðurskiftunum, og sáttmáli er gjørdur og undirskrivaður av øllum viðkomandi pørtum.